## Óttast nýggjan uppreistur

Tað er ikki vist, at tað verður friður´i Sri Lanka, hóast tann tamilsko uppreistrarherurin er givin við bardaganum við stjórnarherin. Talsmenn fyri stjórnina í Colombo siga við altjóða tíðindastovurnar, at teir óttast fyri, at smáir tamilskir bólkar fara at halda fram við bardaganum. Talsmenninir siga, at tað finnast slíkir bólkar í øllum teimum størru býunum í landinum, og at teir eru vápnaðir. Týsdagin kunngjørdi srilankiski forsetin, at borgarakríggið var av, men fyrradagin vóru aftur samanbrestir, og minst átta fólk lógu eftirá.



## Myrdu kenda songkvinnu

Ein egyptiskur politikari og ein fyrrverandi løgreglumaður eru dømdir til deyða fyri at hava beint fyri libansku songkvinnuni Suzanne Tanim. Kvinnan varð funnin myrd í íbúð síni í Dubai seinasta summar. Hon og egyptiski politikarin høvdu verið væl, men vóru farin hvør til sítt, og myndugleikarnir komu eftir, at egyptiski politikarin hevði biðið ein fyrrverandi løgreglumann beina fyri henni. Báðir vórðu tiknir, og í vikuni vórðu teir dømdir til deyða fyri morðið. Suzanne Tamin var kend poppstjørna, og BBC sigur, at drápsmálið hevur vakt stóran ans í Miðeystri.

# 3.000 tons fleiri í Saltangará í ár

**Fýra teir fyrstu mánaðirnar í ár hevur landingarmiðstøðin hjá Beta í Saltangará landað heili 3.000 fleiri enn somu tíð í fjør – og heili 6.300 fleiri enn í 2007**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Samstundis, sum nøgdirnar av toski, ið landaðar eru seinnu árini, eru nógv minkaðar, eru nøgdirnar av upsa nógv øktar.

Hetta sæst ikki minst aftur í tølum hjá landingarmiðstøðini hjá Beta í Saltgangará, sum serliga landar partrolarar, ið veiða upsa.

Gulllaksalandingar eru eisini ein týðandi partur av virkseminum hjá Beta í vertíðini.

### Fleiri landingar

Fýra teir fyrstu mánaðirnar í ár eru tilsamans 13.800 tons løgd upp í Saltangará, sum er heili 3.000 tons fleiri enn somu tíð í fjør.

Taka vit árið 2007, landaði Beta hetta árið 7.500 tons fram til endan av apríl, og tað eru heili 6.300 færri enn fram til endan av sama mánaði í ár.

Tað er tó ikki bara upsin, sum ger allan munin í ár, tí gulllaksaveiðan byrjaði eisini væl fyrr í ár enn eitt nú í fjør.

Við endan av apríl mánaða í ár hevði landingarmiðstøðin hjá Beta landað tilsamans 1.910 tons av gulllaksi, meðan nøgdin av gulllaksi somu tíð í fjør var 500 tons – og í 2007 380 tons.

### Góð upsaveiða

Á landingarmiðstøðini vísa tey á, at umframt øktu gulllaksanøgdirnar higartil í ár, hevur upsaveiðan í ár eisini verið rættiliga góð.

Gomlu kubatrolararnir eru skiftir út við nýggjari og betri skip, har nýbygningarnir, Stelkur og Bakur, vóru teir fyrstu.

Rókur og Lerkur eru eisini komnir í flotan eins og nýbygningarnir, Heykur og Falkur, hava verið í gongd allar teir fyrstu fýra mánaðirnar í ár, siga tey.

Heykur og Falkur høvdu ávísar trupulleikar at dragast við, tá teir komu í flotan við endan av 2007. Skipini, sum komu til landið í desember hetta ár, rendu seg beint í fiskimannaverkfallið, sum var um ársskiftið 2007/ 2008.

Tá skipini so umsíðir sluppu útaftur seint í januar 2008, fingu tey ávísar byrjunartrupulleikar at dragast við. Tí fingu tey heldur ikki fulla úrtøku hetta várið.

Í vár hava øll seks skipini hjá Beta havt góða og støðuga veiði, og hetta saman við øktu gulllaksalandingunum er orsøkin til, at landaðu nøgdirnar fyrstu fýra mánaðirnar í ár hava verið nógv størri enn nakrantíð.




*Landingarmiðstøðin hjá Beta í Saltangará hevur fram til endan av apríl í ár landað tilsamans 13.800 tons, sum er heili 3.000 tons fleiri enn somu tíð í fjør*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Nógvar landingar í Saltangará hesa vikuna

**Á landingarmiðstøðin hjá Beta í Saltangará hava tey havt úr at gera hesa vikuna, og tá vikan er úti, hava landararnir landað heili 10 skip**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin vóru fýra skip inni. Partrolararnir Jaspis og Ametyst høvdu 288.000 pund, og Stekur og Bakur høvdu 372.000 pund.

Veiðan hjá skipunum var upsi.

Týsdagin landaði Eysturbúgvin 240.000 pund av gulllaksi. Eysturbúgvin partrolar saman við Vesturbúgvanum, sum landaði í Vestmanna.

Polarhav og Stjørnan, sum eisini fiska gulllaks, landaðu hósdagin. Skipini vóru full undir lúkurnar, og veiðan vá 560.000 pund.

Í dag landar garnaskipið Oknin í Saltangará. Teir hava umleið 20.000 pund av svartkalva.

Leygardagur er í morgin, men heldur ikki tá verður turt gólv á landingarmiðstøðini hjá Beta.

Í morgin landar nevniliga nýggjasta parið hjá Beta, sum er Heykur og Falkur.

Væntandi er, at Heykur og Falkur hava umleið 300.000 pund, nú skipini koma inn at landa.

Í greinini omanfyri sæst, at landingarnøgdirnar hjá Beta eru nógv øktar higartil í ár.

Við endan av apríl vóru tilsamans 3.000 tons fleiri løgd upp í Saltangará í mun til somu mánaðir árið fyri.




*Bakur og Stelkur hava roynst sera drúgvir, síðan skipini sum nýbygningar komu í flotan. Mánadagin løgdu tey 372.000 pund av upsa upp í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*